sosialurin

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Fyritøkuleiðari: Kristian Dahl
Ljósmyndari: Kalmar Lindenskov

Blaðfólk: Randi Jacobsen
Dagny Joensen
Hilmar Jan Hansen
Jóannes Eidesgaard

Útgevari, uppseting og prent: P/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegi 26, Argjum

Postadr.: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 11820
Telefax: 14720

Ræður um at fyrireika seg til framtíðina

Oddagrein

Í farnu viku var stór framsýning og ráðstevna í Aberdeen um frálandavinnuna. Slík messa er á hvørjum ári, skiftandi millum Stavanger og Aberdeen. Á hesi framsýning eru framleiðarar av ymiskum útbúnaði til frálandavinnuna. Harafturat er ráðstevna við fyrilestrum um aktuell mál í frálandavinnuni.

VANLIGA luttaka føroyingar á fiskarimessum og øðrum messum antin við egnum bási ella teir eru vitjandi. Vit hava av náttúrligum grundum ikki luttikið á oljumessu áður, tí so stutt er frálíðið, síðani spónurin varð settur í og vit fóru at kanna undirgrundina. Men tær stóru uppdagingarnar vestan fyri Hetland, har olja er funnin skamt frá okkara marki, hava sjálvandi birt uppundir áhugan í Føroyum fyri hesi vinnu. Tað var í kjarlarvørrinum á hesum uppdagingum, at føroyingar í 1991 fóru fjølmentir avstað - ikki sum luttakarar - men sum vitjandi til oljumessu í Aberdeen. Nú fýra ár seinni hava føroyingar verið við á messuni við sínum egna bási. Teir umleið 80 føroyingarnir tvs. luttakarar og vitjandi, komu heimaftur fríggjadagin.

TAÐ er sjálvandi rætt og rímuligt at seta spurningin, um tað ikki er alt ov tíðliga hjá føroyingum at fara við á eina oljumessu við egnum bási, nú hvørki olja ella gass er funnið á føroyskum øki! Og at spyrja, um ikki hetta eru burturspiltir pengar og orka! Hetta halda vit fyrst og fremst tey fólk, sum hava verið við, skulu sleppa at svara uppá. At oljuumsiting og -ráðleggingarnevnd eru við sigur heldur ikki so lítið um tann týdning, ið eisini almennu myndugleikarnir leggja í slíka luttøku.

OKKARA fatan er tann, at hóast sumt kundi verið lagt øðrvísi til rættis, er rætt at vera við so ella so. Spurningurin vil altíð vera, hvussu nógv tú skal gera burtur úr. Tað er annars ikki altíð tú her og nú sært úrslitið av eini slíkari luttøku, men endamálið er líkasum eisini at føla seg fram og fáa eina hóming av, hvat tú her hevur við at gera. Hetta er jú nakað heilt nýtt. Slíka føling fært tú kanska best, um tú sjálvur hevur ein bás, sum verður vitjaður av fólki í frálandavinnuni. Tá fært tú vitan um teirra leiklut, teirra kunnleika til krøv o.l. í hesi vinnu, og tú fært eisini kunnað tey um okkara umstøður ella manglandi umstøður. Kanska tú ikki kemur heimaftur við sáttmálum, men nakað er sett í gongd í tonkunum og tú er tí betur førur fyri at vera við í orðaskiftinum um, hvussu vinnan skal mennast í Føroyum. Yvirtøkan av undirgrundini hevur sett í gongd ein útvikling, sum vit sjálvi skulu stýra. Vit halda, at innsavning av vitan og miðvís tilrættalegging er besti hátturin at vera fyrireikaður uppá ta kollvelting, sum ein frálandavinna kann gerast fyri okkara samfelag. Betur er at vera fyrivarin enn eftirsnarin.

Sosialurin

Viðmerking

Tað skal valdast kritikkur

Sjálvandi hevur eisini »leiðarin« í Sosialinum sín fulla rætt til at finnast at tí arbeiði, sum javnaðarflokkurin hevur sett meg til at umsita í Tinganesi.

Hetta hevur sami »leiðari« sanniliga eisini gjørt brúk av, men tað skal hann endiliga halda áfram við.

Tá eg sigi so, so er tað ikki tí, at smá fimm ár í andgletti hava givið mær so harða húð, at hesar atfinningar ikki rína við. Nei, men er tað so, at kritikkurin er sakligur, so kann hann sjálvandi altíð brúkast til okkurt positivt.

Hin vegin so er kritikkur eisini ein staðfesting av, at okkurt verður gjørt. Um einki verður gjørt, so er ikki annað at kritisera enn júst tað, at einki verður fingið á skaftið.

Men tað, sum verður ført fram í »leiðaranum« fríggjadagin 8. sept., tað má eg siga, at eg als ikki finni meg í. Fyri tað fyrsta, so byggir »leiðarin« á ósannindir, og fyri tað næsta, so eri eg yvirhøvur ikki samdur í tí niðurstøðu, sum rithøvundurin hevur, hvør hann ella hon so enn er.

Eg verði m.a. lagdur undir at hava sagt, at nú skulu 80 fólk sigast upp innan tað almenna orsakað av lønarhækkingini, sum landsstýrið og fakfeløgini gjørdu semju um. Hesi orð eru ongantíð farin um mínar varrar.

SvF hevði henda boðskap sum yvirskrift í eini tíðindasending, har teir eisini høvdu eina samrøðu við meg um fíggjarløgina. Men hetta var ein útlegging, sum SvF gjørdi. Míni orð vóru tað so ikki.

Álvaratos, tá ið Sosialurin leggur so harðliga út móti mær persónliga, so haldi eg at minsta krav má vera, at hetta byggir á sannleikan. Alt annað er ov lágt og ósakligt.

Víðari verður m.a. sagt:

– *at landsstýrismaðurin ikki veit, hvat hann sigur*

– *at flokksleiðslan má seta hann upp á pláss*

– *at hetta smakkar av hevnd og revsing fyri samráðingarnar við fakfeløgini*

– *at politikkarar manna mest um Thatcher Ongland*

– *at flokkurin møguliga eigur at stinga í sekkin og fara í andstøðu.*

Eg haldi hetta vera so grovt og so langt úti, at vit mugu krevja av blaðstjóranum, at hann sigur okkum, um hetta er ein nýggj linja, javnaðarflokkurin nú skal halda.

Eg taki fult undir við Astrup, tá hann sigur, at dulnevnd lesarabrøv ikki áttu at komið í nakað blað. Men her er ikki talan um dulnevnt lesarabræv. Hetta er jú »leiðarin« í javnaðarblaðnum, og eg havi altíð hildið, at hesin ideologiskt rættaði kósina av. Tí hava orðini í »leiðaranum« munandi meira tyngd enn dulnevnd lesarabrøv, hóast rithøvundurin í hesum førinum eisini er ókendur fyri okkum øll uttan fyri blaðstjóran.

Eg eri í botn og grund ósamdur við niðurstøðuna. Er tað so, at ein almennur stovnur kann rekast bíligari við somu tænastu, so skal hann gera tað, eisini um tað merkir at starvsfólk verða uppsøgd.

Etla tú at tvíhalda um, at ongi fólk skulu sigast upp innan tað almenna, so er tað bensin á bálið hjá Jøgvan við Keldu og fólkaflokkinum.

Ein eigur væl eisini at hugsa um, at vit ikki við reinari samvitsku mótvegis skattgjaldarunum gjalda ein yvirprís fyri almennar tænastur, tí vit ikki vilja gera neyðugar tillagingar.

Uppsagnir eru sjálvandi einki mál í sær sjálvum, soleiðis sum býráðsformaðurin í Klaksvík heldur, men vit mugu seta okkum sum mál, at almenni sektorurin verður rikin so forsvarliga og bíliga sum gjørligt. Sjálvandi eisini um prísurin er onkrar uppsagnir. T.d. eigur virksemið á einum skúla at laga seg eftir næmingatalinum, og talið av starvsfólkum á einari deild hjá t.d. Toll- og Skattstovuni eigur sjálvsagt at laga seg eftir arbeiðsbyrðini og tænastustøðinum, sum vit ynskja at veita. Alt annað er ábyrgdarleyst mótvegis skattgjaldarunum.

Vit mugu við øðrum orðum trimma tann almenna sektorin soleiðis, at vit við hægst neyðuga tali av starvsfólkum fáa ta tænastu, sum vit nú einaferð ynskja. Alt annað er óforsvarligur politikkur, og óforsvarligur er rættur javnaðarpolitikkur ikki, tvørturímóti.

Undir samrøðuni við SvF segði eg m.a. eisini, at uppsagnir ikki var eitt politiskt mál, men at hetta var ein administrativ uppgáva, um tað gjørdist neyðugt innan tann fíggjarliga karm, sum vit kunnu finna semju um.

Annað er, at vit ikki duldu fyri undir samráðingunum, at ein møgulig fylgja av eini lønarhækking kundi gerast uppsagnir, men framvegis er málið administrativt. Tað mugu einstøku leiðslurnar sjálvar gera av.

Men fyri at venda aftur til »leiðaran« fríggjadagin, so má eg enn einaferð spyrja blaðstjóran ella flokksleiðsluna, um hetta er ein nýggj linja, sum javnaðarflokkurin ætlar at halda seg til?

Er tað veruliga so, so eru vit fleiri, sum hava ideologiskar trupulleikar.

Eg vænti satt at siga, at blaðið útvegar mær og mongum øðrum eitt svar upp á henda spurningin. Eg taki tað fyri givið, at blaðstjórin tekur spurningin í fullum álvara og svarar skjótt.

Jóannes Eidesgaard,
landsstýrismaður

Bilur til sølu

Mitsubishi Pajero 2.5 TD (langa modellið). Árgangur 12/1986

Tlf. 18032

UMVÆLING

Eg átaki mær at umvæla øll el-tól kring landið. Havi í hesum sambandi útbúgving sum servicumaður

Eri at hitta á **tlf. 56651**, best í døgurðatímanum og eftir kl. 18.00